## DAGSINS MEINING

# Friður á Jørð

Í jólaboðskapinum, sum varð sagdur nøkrum seyðamonnum fyri meira enn 2000 árum síðani eru tveir høvuðsboðskapir: frelsarboðskapur og friðarboðskapur. Við frelsarboðskapinum sendi Gud son sín til Jarðar, soleiðis, at ein og hvør, sum trýr á hann skal verða frelstur. Hesi eru størstu gleðiboð, sum nakrantíð hava ljóðað fyri mannaoyrum. Tey vórðu boðað ikki fyri kongum, keisarum ella ríkmonnum, men fyri nøkrum fátækum seyðamonnum, sum lógu nátt úti uttan fyri bygdina Betlehem í Palestina. Og barnið, sum gjørdist heimsins frelsari, átti hvørki vøggu ella tak yvir høvdið, tí var tað lagt í eina krubbu í einum fjósi. Hetta má geva okkum øllum nakað at hugsa um. Hesin boðskapur um heimsins frelsara er so at siga tann persónligi parturin av jólaboðskapinum. Her má hvør sær gera av, hvussu hann ella hon taka ímóti gleðiboðskapinum frá Betlehems fløtum. Vit eiga øll at steðga á í tí hurlivasa, sum jólini nú eru vorðin og hugsa væl og leingi um hendan boðskap.

So er tað hin parturin av jólaboðskapinum, tann, sum boðar frið á Jørð og í menniskjunum góðan tokka. Hvussu hevur mannaættin livað upp til hendan boðskap? Taka vit okkara tíð, so er svarið ikki júst beinleiðis hugaligt. Kríggj, ósemjur, hungur og hall, lemjandi sjúkur og náttúruvanlukkur. Vápnadubbingin er um at fara út um alt skilaligt mark. Í heiminum eru nú so nógv atomvápn, kemisk vápn og bakteriologisk vápn, at tað veruliga ber til, um onkur vil, at týna mannaættina sjeyti ferðir, hava serfrøðingar roknað út. Frá tí stóra og óhugnaliga Kalda Krígnum fór heimurin beint yvir í økis- ella regiónskrígginі. Hvat hesi kríggj hava kostað mannaættini er mest sum vónleyst at gera upp, men líðingarar hava verið ræðuligar og hava kostað milliónum lívið.

Gleðiboðskapurin kom til Jarðar við einum pinkubarni. Barnið er ein hin mest verjuleysa og óseka veran á foldum. Hvussu verður farið fram móti børnunum í dag? Hvussu støðan er í Ríka Heiminum, skulu vit ikki meta um her. Tað man vera so sum so hjá mongum. Í fátæka partinum av Verðini stendur ikki væl til. Børn í stórum tali doyggja í hungri og í vanrøkt. Milliónir av børnum fáa als onga ella ikki nøktandi skúlagongd, búgva vánaliga ella halda til úti á berajóli á gøtunum í heimsins stórbýum, har tey verða misnýtt og forfylgd.

Hendan myndin hóskar illa við boðskapin um frið á Jørð og um góðan tokka. Tó eru tekin um broytingar til tað betra. ST, UNESCO og UNICEF gera eitt veldugt arbeiði til tess at bøta um korini hjá hesum børnum. Privatir og kirkjuligir felagsskapir royna hvør í sínu lagi at at hjálpa Heimsins illa støddu børnum. Hetta er sera gott og eiga allar heimsins stjórnir at stuðla hesum arbeiði. Føroyar eru eitt av heimsins ríkastu londum og áttu vit sjálvsagt at tikið eina størri ábyrgd á okkum. Hevði tað ikki verið eitt hugskot, at allir flokkar nú játtaðu, at tær almennu Føroyar eftir valið 20 januar 2004 fara at lata hóskandi part av fíggjarlógini til barnaarbeiðið hjá ST. Hetta kundi verið okkara íkast til at skapa frið á jørð. Ófriðurin í Heiminum kemur av ójavnaðinum millum tey, sum hava og tey, sum ikki hava – av muninum millum rík og fátæk lond. Friður fæst bert við at beina burtur ójavnan millum heimsins lond. Vit eiga at átaka okkum okkara ábyrgd. Hvussu vit best gera hetta, eiga okkara politikkarar og vit øll at nýta jólahalguna at hugsa um. Annars eiga vit at takka fyri frið um okkara leiðir og at binda frið á politiska vígvøllinum til eftir høgtíðina. Fólk eru troytt av politiskum klandri og ófriði, og tá valstríðið eftir høgtíðini brestur á, eiga politikkararnir at reka hetta stríð, sum tað sømir seg eini friðarligari og mentaðari tjóð. Sosialurin ynskir øllum Føroyum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýttár.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Naser Khader og Tjóðveldisflokkurin

**Kristian Magnussen**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



Í tíðindasendingini fríggjakvøldið slapp Høgni Hoydal at føra fram, uttan viðmerking frá tíðindamanninum, at Naser Khader átti at havt annað at gjørt enn at spæla formyndari í Føroyum. Tað er millum aðrar Tjóðveldisflokkurin, ið hevur drigið málið niður til Danmarkar og ætlar sær í Fólkatingið við tí, um flokkurin »hesuferð« skal takast á álvara.

Torbjørn Jacobsen, fólkatingslimur fyri Tjóðveldisflokkin, boðaði í Politikken tann 30. nov. frá, at hann fór at taka føroyskan fosturtøkupolitikk til viðgerðar í danska Fólkatinginun, fyri at fáa fólkatingið til at hjálpa Tjóðveldisflokkinum við at liberalisera fosturtøkulógina. Í Politikken tann 30. nov. er grein, har m.a Torbjørn er kelda. Har verður m.a. ført fram

*»…Thorbjørn Jakobsen er republikaner og en af de to færøske repræsentanter i det danske Folketing. Han vil fremlægge sagen i Folketinget, og håber dermed at kunne gøre noget for at komme den stramme kurs i abortpolitikken til livs.«*

Somuleiðis er Kristina Háfoss kelda í aðrari grein í Politikken tann 1. des., har hon er endurgivin fyri at siga

*»…Pro Vita burde slet ikke være på finansloven. Kvinder skal have ret til selv at bestemme over deres egen krop - også på Færøerne«, siger Christina Harfoss, finanspolitisk ordfører for regeringspartiet Republikanerne.«*

Sjálvandi skulu danskir politikarar ikki blanda seg í, hvørja fosturtøkulóg, ið vit skulu hava í Føroyum, og hvørji feløg, ið skulu stuðlast á fíggjarlógini, men tá sjálvur Tjóðveldisflokkurin boðar frá, at hann vil hava danska Fólkatingið at hjálpa sær ímóti føroyingum, hvat skulu so danskir fólkatingslimir halda? Øll mál, ið verða tikin upp á Fólkatingi, mugu fólkatingslimir viðgera.

# Vit kunnu savna fólkið

**John Johannessen**
*Valevni fyri Javnaðarflokkin í Suðurstreymi*



Saman at stremba. Tað er einasta fortreyt fyri at vinna Føroyum størri sjálvbjargni. Ein felags stremban eftir at skapa best møguliga samfelagið fyri flest møgulig fólk.

Vit í Javnaðarflokkinum ynskja eina felags stremban. Javnaðarflokkurin kann savna fólkið. Vit eru møguleikin, fyri at finna felags grundvøllin millum føroysku flokkarnar á sjálvbjargnisleið.

Okkara mál er ein sjálvbjargniskós, sum hevur stuðul í fólkinum. Ein semja, sum ger tað møguligt at føra veruligan politikk aftur í Føroyum.

At rópa Føroyum fullveldi og taka einkarrætt upp á sjálvbjargni í 6 ár, tað gav ongi úrslit. Fólkið bleiv gloymt og fólkið spjaddist.

Fólkið skal savnast aftur. Vit hava møguleikan at ganga eina nýggja politiska leið við trivnaðinum og tryggleikanum hjá einstaka borgaranum í fremstu røð. Ein nýgg politisk leið, har sjálvbjargnispolitikkur veruliga fær eitt innihald. Ein leið, har sjálvbjargni eisini snýr seg um at fáa gerandisdagin hjá fólki at hanga saman.

Veruligt sjálvbjargni er, at vit kunnu siga »FØROYAR FYRI ØLL«!

# Grundarlagið

**Dan R. Petersen**
*javnaðarmaður*



Útflutningurin, sum stavar frá skipum og fiskavirkum, er grundarlagið undir øllum okkara samfelag.

Fiskur er dýrur matur, tvs tá ið hann liggur í køli- og frystidiskum á meginlandinum. Men synd at siga, at hann er dýrur á uppboðssøluni á Toftum, ella tá selt verður beinleiðis til virkir. Her hugsi eg serliga um upsan. Hví fær man bert 2-3 kr kg fyri fisk, sum brúkarin í Týsklandi skal lata 90-100 kr fyri? Fiskasølan hevur keypt virkið í Hvalba, tí sum stjórin sigur, nú kunnu teir júst framleiða tað, ið keyparin vil hava. Teir, ið varða av nýggja Skálaberg, siga tað sama. So freistast man at spyrja: hvat framleiða so hinir?

Skálamaðurin Jørgen Beck hevur nú útarbeitt eina maskinu, ein skrædlara sum sker djúpari, alt tað brúna undir skræðuni burtur. Hetta er eitt feittlag, sum fær flakið at tráðna. Kósin og p/f Beta hava fíggja prototypuna, sum nú er sett í produktión í Danmark. Vónandi fáa vit eina betri útflutningsvøru við hesum projekti. Tað er bara undarligt, at onki annað flakavirki hevur víst áhuga fyri hesi ætlan. Serliga tá hugsa verður um, hvussu tungt flakavinnan og nú eisini isfiskatrolararnir koyra. Seinasta verkfall vísti, at tað var flakavinnan, sum ikki orkaði nevniverda lønarhækking. Sami tungi rakstur dregur nú hýrurnar niður eisini.

Tað gongur ikki lonngur, at tey, íð arbeiða í tí sektorinum, sum øll onnur liva av, tey ið draga tað tyngsta lessið, skulu hava tað lægstu lønina. Hetta er eitt álvarsmál. Tí eigur ein komandi vinnumálaráðharri at seta eina nevnd, sum kann útgreina, hvussu vit fáa sum mest burturúr. Um neyðugt endavenda allari vinnuni. Og vónandi verður tann vinnumálaráðharrin javnaðarmaður.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# 240 kr at koyra um Leirvíks-fjørð ella 4.800 kr fyri ein 40 túra kubba um Leirvíksfjørð

**William Smith**
*Sørvágur*

Um sama mundið sum fast samband um Vestmannasund nú hevur verið í eitt ár, er fyrsta skotið latið av til fast sambandand um Leirvíksfjørð.

Fólk norðanfyri eru, eins og vit her Vesturi, vóru, í einari trancu í løtuni av offarakæti av, at nú er byrjað, og her vendst ikki aftur. 1. august 2006 so eru Klaksvíkingar og teirra fólk frí og kunnu kalla seg ein part av meginøkinum.

Men hvat so, hvat man tað fara at kosta at nýta henda tunnilin, jú tað er roynt, øll tølini finnast, nú skal eingin royndartíð vera, og ongar kanningar gerast, tølini eru jú til, so tað er bert at fáa faktornar settar upp, og ger so væl.

375 milliónir kemur hetta bygningsverk at kosta; 205 milliónir frá landinum.

Eftir eru 170 milliónir, sum tá ið avtornar blíva til 215, ein meirkostnaður upp á umleið 45 milliónir kann væntast, og skal hesin eisni gjaldast við bummgjald.

10 milliónir til rakstur um árið, og ein avdrátt upp á 15 milliónir tvs 25 milliónir skulu inn um árið, gjøgnum bummgjadið, og er hettar sama tal, ið tunnils-stjórin, Dávur Reinert Hansen, segði seg meta, í úttalisli við Útvarp Føroyar, í samband við at fyrsta skotið var latið av í Leirvík hendan dagin..

Vágatunnilin skuldi hava um 17-18 milliónir til rakstur og avdráttir um árið, gjøgnum bummgjaldið fyri at svara hvørjum sítt. Hettar talið er síðani blivið til 25 milliónir.

So ein vøkstur uppá 7-8 milliónir, mugu vit eisni rokna við, so umleið 32-33 milliónir skullu fíggjast við bummgjaldið.

Teir vænta um 720 bilar um Leirvíks fjør um árið, 262.800 bilar um árið

Men hvat kemur tað so at kosta.

33 milliónir skulu 262.800 bilar fíggja, og tað gevur eitt miðal-tal upp á 251,14 krónur/bil, hettar er júst sama tal, sum bleiv álagt Vágafólki at gjalda, eftir at MVG varð burturtikið, men eftir áheitan frá vágafólki og strandferðsluni og øðrum, ið hildu seg vita, at tað fóru at vera meira enn 350 bilar sum fóru at gera nýtslu av tunlinum, bleiv gjaldið sett niður á 188 kr.

Tíanverri er einki MVG at trekkja frá hjá Norðoyatunnilinum, so her gerst einki.

Tó so, ein glotti er, her vesturi bleiv ferðslan um Vestmannasund, øllum kunnugt meira enn tað dupulta av tí, sum mett varð, og harvið kom ein reduktión av kostnaðium uppá 8 kr, sum var kærkomin 1. apríl í 2003, so vit kunnu jú rokna við at tað fara at koyra 1440 til 1500 bilar um Leirvíksfjørð, so her kann ein avsláttur uppá 12 kr, væntast, og so eru vit niðri á umleið 240 kr fyri eina passagu.

So, ikki tykkum at siga, tað loysir seg betur at búgva í Leirvík, um koyrast skal til Havnar til arbeiðis.

Soleiðis er tað.

# Miðfyrisiting fyri fólkið

**Javnaðarflokkurin hevur eina ætlan fyri, hvussu miðfyrisitingin kann gerast betri og meira effektiv fyri bæði borgaran og starvsfólkið**

**Bergur P. Dam**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi*



Í tíðindasending hjá útvarpinum hevði útvarpsmaður eina viðmerking um ætlaninar hjá Javnaðarflokkinum fyri eini betri, meiri effektivari og smidligari miðfyrisiting. Hetta var ikki ein journalistisk frágreiðing um innihald og høvuðsendamál í ætlanini, men heldur ein polemisk viðmerking um lønar- og setanarviðurskifti hjá aðalstjórunum.

Eftir útvarpssendinigina hava fleiri fregnast eftir, hvat uppskot Javnaðarfloksins í veruleikanum snýr seg um.

**Samanhangandi miðfyrisiting**

Høvuðsendamálið við okkara ætlan er at betra miðfyrisitingina. Betri at gagnnýta ta orku og ta vitan, sum finst hjá mongu dugnaligu og ágrýtnu starvsfólkunum í miðfyrisitingini.

Vit vísa á, at tann ovurstóri útreiðsluvøksturin ið hevur verið seinastu 5, árini ikki í nóg stóran mun sæst aftur í betri tænastu, størri rættartrygd ella meira effektivari miðfyrisiting.

Ein av stóru trupulleikunum er at vit hava fingið 9 smá "landsstýri", har samstarv og samskipan vantar. Fyri ein stóran part er hesin vøkstur úrslit av handlum í samband við at skipa samgongur.

Vit halda at bygnaðurin í miðfyrisitngini ikki kann verða stýrdur av tilvildarligum broytingum í samgongusamansetingum, men má lagast eftir, hvat er best fyri føroyska samfelagið.

Tí skjóta vit upp, at málsøki, sum natúrliga hoyra saman, eisini verða fyrisitin av sama ráð, t.d. at øll kommersiell vinna - annahvørt tað er á sjógvi ella á landi - hevur eina felags fyrisiting. Somuleiðis skjóta vit upp, at øll innlendismál verða fyrisitin av einum Innlendis- og lógarmálaráð.

Niðurstøðan er, at tað er hóskiligt at hava 6 aðalráð. Sí yvirlit.

**Tørvur á dubbing**

Øll, sum kenna til viðurskiftini í miðfyrisitingini vita, at stóri útreiðsluvøksturin ikki í nóg stóran mun sæst aftur í dygd. Framvegis er so, at einstøku ráðini hava ov lítla orku á týðandi økjum. Við verandi skipan er framvegis tørvur á nógv størri játtanum. Flestu ráðini eru alt ov illa mannað, tá tað snýr seg um t.d. lógar- og KT serfrøði. Men við at minka talið av ráðum verða einstøku ráðini betri før fyri at fremja tær uppgávur teimum er álagt. Og á sama hátt fer ein betri samskipan millum ráðini at økja dygdina.

**Hurðarnar upp**

Fyri at gera samskifti við borgaran meira effektivt og smidligt, skjóta vit upp, at ein samskiftis- og kunningardiskur verður gjørdur. Hesin skal kunna taka sær av fyrsta samskiftinum - veita vegleiðing og tryggja, at fyrispurningur ella mál fær røttu viðgerð. Eisini skal hesin diskur vegleiða um kærumølugleikar, um ein borgari kennir seg órættvíst viðfarnan.

Endamálið er at røkka eini miðfyristing, sum ikki veksur so skjótt sum samfelagsbúskapurin annars - á henda hátt fáa vit eina fyrisiting, sum í longdini verður lutfalsliga bíligari, samstundis sum hon verður betri og meira effektiv.

**Tey 6 aðalráðini:**

- *Løgmannsfyrisitingin*
  samskipar landsstýrisarbeiðið og umsitur uttanlandsmál.
  Við hesum verða uttanlandsmál aftur málsøki hjá løgmanni
- *Fíggjarmálaráð*
  umsitur vanlig fíggjar- og peningamál umframt starvsfólkamál
- *Innlendismálaráð*
  hevur ábyrgd av kommunumálum, lógarmálum, landsstovnum so sum strandferðslu og bygdarleiðum, postverki, samskifti og umhvørvi.
  Undir innlendismálaráðið verða sostatt lagdir almennir stovnar, sum higartil hava verið umsitnir av vinnumálaráðnum, eins og umhvørvismál, ið hevur verið málsøki í oljumálaráðnum. Vaktar- og bjargingartænasta verður somuleiðis ábyrgdarøki í Innlendismálaráðnum.
- *Vinnumálaráð*
  umsitur alla kommersiella vinnu á sjógvi og landi, alivinnu, oljuvinnu, handverk og ídnað, landbúnað, orku o.s.fr.
  Higartil hevur vinnan á sjógvi - uttan alingin - verið umsitin í Fiskimálaráðnum, meðan vinnan á landið er umsitin í Vinnumálaráðnum. Javnaðarflokkurin vil gera hesi bæði ráð til eitt, sum umsitir øll vinnumál.
- *Almanna- og heilsumálaráð*
  umsitur almannalóggávuna, almannastovuna, primeru heilsutænastuna, serforsorg, heimarøkt, sjúkrahúsverkið, apoteksverkið.
  Sostatt verða Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið aftur løgd saman í eitt ráð.
- *Mentamálaráð*
  umsitur kirkju, útbúgving, gransking og mentamál annars

# Bráðfeingis hjálp til alivinnuna

**Bjarki Mohr**



**Pantseting av aliloyvum er ein *bráðfeingis* hjálp til alivinnuna.**

Leingi er tað, ið væl skal vera. Eftir drúgva tíð staðfesti ein dómur í Eystara landsrætti - gott ár ov seint - endiliga, at aliloyvir kunnu pantsetast. Sjálvandi freistast man til at siga, hví skuldi eitt umsetiligt aliloyvi ikki kunna pantsetast, tá hugsa verður um, at hesi júst eru umsetilig, og at hart kroystu alifyritøkunum vænta fígging til framhaldandi rakstur.

At føroyskar fyritøkur - í hesum føri ein peningastovnur - enn einaferð mátti fara ígjøgnum rættarskipanina, til tess at fáa staðfest eitt krav, sum fyri tey flestu vinnurekandi - herundir eisini peningastovnar - er ein sjálvfylgja, er tíverri eitt tekin um politiskt máttloysi og væntandi innlit hjá avvarðandi myndugleikum.

At loyvini kunnu pantsetast merkir ikki, at man frátekur mynduleikunum rættin til at meta um hvørt nýggi rakstrarharrin/felagið er egna at reka vinnuna víðari. Hann skal í hesum føri bert tryggja sær, at nýggja felagið lýkur lógarinnar ásettu karmar.

Eitt stig rætta vegin. Men hvussu koma vit víðari? Ein pantseting útvegar ikki størri eginfígging, og tað er vágafúsur peningur tørvur er á, skal alivinnan koma undan truplu tíðini hon er í. Alivinnan ber ikki á mál, um vit framhaldandi standa sum ryssa yvir deyðum fyli. Okkum tørvar verkligar loysnir og nýhugsan á økinum.

Ein tann størsti trupulleikin hjá vinnuni er, at fyritøkurnar ikki hava fríøkir. Vitandi at Føroyar geografiskt ikki gerast størri - og at fyrðirnir ikki økjast í vavi og tali - er neyðugt at vit politiskt fara inn og setur skynsamar avmarkingar, soleiðis at tær fyritøkur í megna at hóra undan, í framtíðini hava møguleika at leggja ein skynsaman rakstur tilrættis. Tað gerst bara, við einum væl umhugsaðum vinnupolitikki á økinum.

Hin avbjóðingin - at okkum tørvar váðafúsan kapital innan alingina - vinna vit bert á, um vit hava dirvi at lata verjustøðuna falla, og - undir skipaðum vinnupolitiskum viðurskiftum - loyva útlendskum áhuga-bólkum at seta eginpening í alivinnuna. Vit hava møguleikan, at lata alivinnuna fara fyri gravarbakka, ella at geva henni neyðuga blóðflutningin, ið kann medvirka til framhaldandi tilverurættin.

Alivinnan er **ikki** eitt **náttúruskapt** tilfeingi - eins og fiskurin í havinum er tað - og tí hava vit møguleikan at stýra hesi vinnuni neyvt, um viljin er til staðar.

Vinnupolitiskar avmarkingar handfara vit, við at leggja treytir á brúksrættin, umframt at vit seta krøv til útlendskar íleggjarir, at hesir skulu stovnsetast í Føroyum - og rinda skatt í Føroyum - soleiðis at Føroya Landstýri megnar at hava tamarhald á støðuni.

Sum politiskur myndugleiki mugu vit seta okkum tað mál, at vit megna at hugsa um heildina í samfelagnum. Alivinnan er ein - lutfalsliga - stórur partur av heildini. Vit mugu hyggja longur enn til nærmasta einstaklingin, soleiðis at vit ikki vakna ein kaldan februar morgun, og gerast varug við, at vit standa fyri fríum falli.

Tað er - hóast alt - betur at eiga eitt sindur av nógvum, enn nógv av ongum.